





Hyggið at Suðurstreymi, Havnini, Argjum og Kirkjubø




at katólska tíðin var frá umleið 1000 til 1540?

Fyrsta sjúkrahúsið í Føroyum var á Argjum. Á hesum lítla sjúkrahúsinum búðu fólk, sum høvdu fingið spitalskusjúku. Tað var ein smittusjúka, sum tey sjúku ikki sluppu av aftur við. Tí var óttin fyri at fáa sjúkuna stórur, og einasta loysn at verja seg móti smittuni var at flyta tey sjúku út á okkurt **avbyrgt** stað, har tey ikki komu í samband við frísk fólk.

Í katólsku tíðini var bispagarðurin í Kirkjubø miðdepil í Føroyum. Argir var partur av garðinum hjá bispi, og einaferð í tíðini varð sjúkrahús bygt á Argjum. Sjúklingarnir á Argjum vóru nevndir argjalimir. Um argjalimir vildu í kirkju, gingu teir um fjallið til Kirkjubøar. Teir sluppu ikki inn í kirkjuna orsakað av smittuvanda, men máttu standa uttanfyri og lurta ígjøgnum eitt hol í vegginum. Enn í dag sæst holið í vegginum á Ólavskirkjuni í Kirkjubø.



Holið í vegginum í Ólavskirkjuni.




**Avbyrgt:** nakað, sum er fyri seg sjálvan.

Sjúkrahúsið á Argjum líktist ikki nógv teimum sjúkrahúsum, sum vit kenna í dag. Roknað verður við, at tað varð gjørt til 12 sjúklingar. Teir sjúklingarnir, sum endaðu á Argjum, vórðu verandi har alt lívið, og tí gjørdist sjúkrahúsið í veruleikanum teirra nýggja heim.

Spitalskusjúka var ein stór plága um alt Evropa, og nógv varð gjørt fyri at basa sjúkuni. Eisini í Føroyum eydnaðist at sleppa av við sjúkuna, og hildið verður, at tann seinasti spitalski sjúklingurin doyði á Argjum í 1740.



Spitalskusjúka

**Spitalskusjúka**
Brúka 1
til uppgávuna

